# Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|---|
| 30.09 | 15.00 | B36-AB | Jens Petur Brattalíð |
| 30.09 | 15.00 | KÍ-EB/S | Dagfinn Olsen |
| 30.09 | 15.00 | NSÍ-HB | Eiler Rasmussen |
| 30.09 | 15.00 | B71-GÍ | Ransin N. Djurhuus |
| 30.09 | 14.45 | VB/S-Skála | Rúni Gaardbo |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 29.09 | B68-FSV04 | Petur Reinert |
| 29.09 | ÍF-HB | Rói Jacobsen |
| 29.09 | LÍF-TB | Høgni Hansen |
| 29.09 | NSÍ-B68 | Bárður Mortensen |
| 29.09 | SÍ-KÍ | Regin Egholm |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 30.09 | B68-GÍ | Bjarki Danielsen |
| 30.09 | ÍF-Skála | Alex Troleis |
| 30.09 | KÍ-EB/S | Jan Gardar |

**Hondbóltur**

Sunset-kappingin

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29.09 | 14.30 | StÍF-Kyndil | Karst. Joensen & Kristian Joensen |
| 29.09 | 14.30 | Neistin-VÍF | Rúni Mohr & Ragnar Simonsen |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 29.09 | 16.00 | StÍF-Kyndil | Karst. Joensen & Kristian Joensen |
| 29.09 | 16.00 | Neistin-VÍF | Rúni Mohr & Ragnar Simonsen |
| 29.09 | 16.00 | KÍF-H71 | Andr. F. Hansen & Ey. Samuelsen |

# Enn ein lykladystur við Løkin

**Í Runavík kenna spælararnir seg ikki trýstar, nú bara fýra umfør eru eftir. Men kring vøllin verður spenningurin helst so stórur, sum hann sjáldan hevur verið tað fyrr**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tapið hjá HB móti eB/Streymi seinasta vikuskifti bar við sær, at teir ikki í sama mun kunnu leggja trýst á NSÍ nú sunnudagin. Men hóast FM-kapprenningin nú eisini í teori'ini bert snýr seg um tvey lið, so er einki at ivast í, at stóri dysturin hetta vikuskiftið er í Runavík.

HB hevur í sín lut kanska enn meira at spæla fyri, um tað kann sigast so. Tapið sunnudagin bar nevnliga eisini við sær, at bronsudysturin við EB/Streym er alt annað enn avgjørdur, og tí er kravið um trý stig kanska harðari nú, enn tað hevur verið.

Og hjá NSÍ ásannar liðskiparin, Óli Hansen, at talan undir øllum umstøðum verður um sera trupla uppgávu.

- Vit hava havt nakrar lykladystir í seinastuni. Uttan at taka nakað frá eitt nú AB, so var tann á Streymnesi júst ein av tí slagnum. Saman við HB hevði EB/Streymur líka sum lúrt í bakhjólinum, og tí vóru trý stig óhugnaliga týdningarmikil.

- Og aftur hesa ferð hava vit ein dyst, sum er ótrúliga týdningarmikil.

Tit hava støðugt sagt, at tit taka ein dyst í senn. Nú eru bara fýra eftir, og tit eru tvey stig á odda. Er tankin um FM-heitið ikki farin at spæla í høvdunum hjá spælarunum?

- Nei, als ikki. Sum sagt, so er tað aftur hesa ferð ein sera týðandi dystur, sum vit skulu spæla. Og tann uppgávan er tað einasta, sum vit hugsa um.

- At tað er HB, sum vit skulu spæla ímóti, ger heldur ikki spenningin minni. Seinnu árini hava vit ofta spælt bæði tættar og avgerandi dystir móti júst HB, tá árið er farið at halla. Ofta hava teir kanska koppað skeiva vegin, og tí hava vit eina og aleina fokus á akkurát hesum dystinum.

Og kring vøllin. Merkja tit ikki, at vónirnar hjá áskoðarunum eru øktar, so hvørt sum sigur oman á sigur er togaður í land?

- Spenningurin er í øllum førum stórur. Tað merkist væl, at fólk eru spent til sunnudagin, eins og tey vóru tað, tá B36 kom á vitjan seinast. Men eg haldi ikki, vit sum spælarar kenna nakað trýst á okkum. Kanska tí eisini viðhaldsfólkini hava góðtikið, at hjá okkum ræður bara um at taka ein dyst í senn.

Saman við venjaranum og liðfeløgunum kann Óli fegnast um, at allir mans hjá NSÍ tykjast klárir til sunnudagin. Í vikuni hevur fokus verið sett á, hvussu skikkiligir spælararnir eru á vøllinum, og enn hava teir fyrsta leikbannið tilgóðar. Og heldur ikki við skaðum er nakað nevnivert at tosa um. Onkrir smávegis snuddir hava verið, sigur Óli. Men eingin somikið álvarsligur, at luttøkan til sunnudagin er hótt.

### Kunnu spæla frítt

Í vikuni stóð greitt, at tað verður uttan Jákup á Borg, at HB skal royna seg í bronsustríðnum. Liðskiparin hevur argast av vøddaskaða í fleiri mánaðir, og nú hevur hann so givið skarvin yvir.

Eisini Rógvi Jacobsen hevur drigist við skaða, men hóast fótliðurin hevur hildið honum frá venjing nú í tvær vikur, so roknar hann tó við, at hann fer at spæla. Og hann er sannførdur um, at enn er nógv at spæla um hjá teimum.

- Vit taka í øllum førum hvørja einastu uppgávu í álvara seinasta dystirnar. Bæði tí vit enn hava bronsuna at spæla um. Men eisini tí nakrir veruligir stórdystir eru á skránni. Ikki minst tann nú sunnudagin.

Undir vanligum

# Við – ikki við

Skaddur: Morten Overgaard (knæskaði) og Danny Rasmussen
Ivasamur: Allan Mørkøre (akslaskaði) og Pætur Jørgensen (sjúka)

Leikbannaðir: Mikkjal Thomassen,

Leikbann: Fabio Vieira

Skaddur: Gert Hansen (knæskaði) og Zsolt Szekeres (knæskaði)
Við aftur: Hans Pauli Samuelsen (eftir leikbann)

Leikbann: Símin Louis Jacobsen
Skaddur: Sámal Joensen (knæskaði)

# NSÍ eigur bestu unglingarnar

**Oddaliðið í Formula-deildini eigur eisini besta unglingaliðið í landinum. Í gjárkvøldið vann NSÍ á HB í finaluni í landskappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

NSÍ er føroyameistari í unglingadeildini. Finalan hjá unglingum varð spæld í Leirvík í gjárkvøldið, og NSÍ vann dystin ímóti HB.

Tað var annars HB, sum legði seg á odda 1-0 í seinna hálvleiki, men NSÍ svaraði aftur við trimum málum, sum Bogi Løkin, Klæmint Olsen og Øssur Dalbúð skoraðu.

Fyrr í ár vann NSÍ eisini steypakappingina hjá unglingum, so liðið hevur verið í serflokki í hesum kappingarárinum.



*Bogi Løkin hevur lagt runavíkingar á odda, og so er fagnaðurin stórur*
*Mynd: Johnny Lamhauge*

# Soleiðis he

**Hagtølini fyri dystirnar sunnudagin geva onkrar greiðar ábendingar um, hvussu leikur plagar at fara í fleiri av dystunum, sum skulu spælast. Eitt nú hevur EB/Streymur ofta staðið seg serstakliga væl í Klaksvík, har teir eisini hava vunnið fýra tær seinastu ferðirnar, sum teir hava vitjað. Í Vági hevur Skála vunnið tríggjar ferðir á rað. Seinasti av hesum sigrunum var forrestin fyrstu ferð, at John Petersen stóð við stýrisvølin hjá Skála. Og á Sandi hevur GÍ als ikki tapt seinastu 10 árini. Størsti spenningurin sambært hagtølunum er í Runavík, har HB ofta hevur staðið seg væl. Men har NSÍ so sanniliga eisini hevur megnað at bitið frá sær. Hagtøl í sjálvum sær avgera tó ongan dyst, men stuttlig kunnu tey vera at hyggja at. Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava dystast í tilsvarandi uppgerðunum í fremstu deildini seinastu tíggju árini.**